# Fólkaflokkurin vendir Norðuratlantsbólkinum bakið

**Fólkaflokkurin fer ikki at vera partur av einum Norðuratlantsbólki, um flokkurin fær umboð á Christiansborg 8. februar. - Tjóðskaparliga støðan hjá Føroyum og Grønlandi kann als ikki samanberast, og tí er eingin meining í hesum samstarvi, sigur Jørgen Niclassen úr Fólkaflokkinum. Vallistin er ikki til reiðar enn**

FÓLKATINGSVAL
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Um Fólkaflokkurin fær umboð í danska fólkatingið 8. februar, fer fólkatingslimur teirra ikki at luttaka í Norðuratlantsbólkinum, sum umboð Tjóðveldisfloksins hevur gjørt seinastu fýra árini saman við grønlendskum fólkatingslimum.

### Seinkað fullveldisgongd

Sambært Jørgeni Niclassen, formanni í tingbólki Fólkafloksins, er flokkurin samdur um, at eingin meining er í samstarvinum millum føroyskar og grønlendskar fólkatingslimir í Norðuratlantsbólkinum, tí tjóðskaparliga støðan landanna millum ikki kann samanberast.

- Grønland er langt aftan fyri okkum í sjálvstýristilgongdini, og teir eru í nógv størri mun heftir at donskum peningi. Við tað at vit hava grundleggjandi øðrvísi tjóðaskaparligt útgangsstøði, er púrt einki høpi í samstarvinum millum føroyingar og grønlendingar á fólkatingi, og um vit skulu samstarva við grønlendingar, fer tað bert at seinka og forða okkara egnu sjálvstýristilgongd, sigur Jørgen Niclassen.



*– Um vit skulu samstarva við grønlendingar, fer tað bert at seinka og forða okkara egnu sjálvstýristilgongd, og tí ynskja vit ikki at halda fram við samstarvinum við grønlendingar í nøkrum Norðuratlantsbólki, um vit fáa umboð á fólkating, sigur Jørgen Niclassen*

Hann metir, at samarbeiðið millum grønlendingar og føroyingar seinastu fýra árini hevur bert verið ein forðing fyri føroysk áhugamál á Christiansborg, og tí ynskir flokkurin at vera óheftur at nøkrum ávísum bólki. Men hava valumboð Fólkafloksins ikki longu sagt í hesum valstríði, at flokkurin júst fer niður at stuðla Anders Fogh Rasmussen og vera heftur at borgarliga vonginum?

- Tað er rætt, at vit stuðla eini borgarligari stjórn, um okkara umboð gerst avgerandi, og tað er náttúrligt, tá vit jú eru ein borgarligur flokkur. Men tað merkir ikki stuðulin er treytaleysur, sigur Jørgen Niclassen.

### Breckmann og Kallsberg

Fólkaflokstingmaðurin vónar, at vallisti Fólkafloksins kann almannakunngerast týsdagin, og enn eru smærri viðurskfti, sum ikki eru komin uppá pláss.

- Tað eru framvegis ivamál, sum vit mugu fáa uppá pláss, og vit hava einstøk nýggj nøvn á listanum. Men tað er eingin ivi um, at Anfinn Kallsberg og Óli Breckmann er frontmenninir hjá okkum, sigur Jørgen Niclassen.

Talan tykist sostatt vera um eina styrkisroynd millum fyrrverandi løgmann og áður roynda fólkatingslimin. Við seinasta fólkatingsval var Óli Breckmann sigursharrin á fólkafloks-listanum við umleið 1300 atkvøðum, meðan Anfinn Kallsberg fekk um 1500 atkvøður.

# Miðflokkurin vil berjast fyri útlendingum

**- Miðflokkurin fer í hesum valdystinum at kasta ljós á skammiligu viðgerðina, útlendingar fáa í Føroyum, samstundis sum føroyskt tjóðarfrælsi skal í fokus, sigur Jenis av Rana, formaður Miðfloksins. Vallisti Miðfloksins verður helst kunngjørdur mikudagin**

FÓLKATINGSVAL
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Endaligi vallisti Miðfloksins fyriliggur ikki enn og verður sambært formanninum Jenisi av Rana helst kunngjørdur mikudagin, og hann fer at telja millum 10 og 15 valevni. Jenis av Rana greiðir frá, at flokkurin hevur viðgjørt støddina á listanum til danska fólkatingsvalið 8. februar, og teir hava valt at stilla upp við einum relativt stórum lista, hóast hin møguleikin eisini hevur verið uppi at venda. Men skulu vit so vænta okkum nakra nýggja kanón á listanum hesuferð?



*- Skriftin áleggur okkum orðarætt at taka okkum av teimum fremmandu í okkara samfelagi, tí eisini vit vóru einaferð fremmand. Hesa skyldu hevur núverandi samgonga so dyggiliga svikið, og útlendingar í Føroyum hava onga trygd fyri degnum í morgin, er náðileysi dómurin hjá Jenisi av Rana*

- Nei. Talan verður í støran um somu nøvnini, sum hava mannað okkara listar seinastu trý valini, sigur Jenis av Rana. Formaður er sjálvsagt realistiskur og væntar ikki nakran fólkatingssess, men hann er kortini spentur til valdystin.

- Eg eri væl vitandi um, at einki annað enn eitt undur kann geva okkum ein fólkatingssess, men vit fara enn einaferð at nýta høvið til at berjast fyri okkara sjónarmiðum, sigur Jenis av Rana.

### Útlendingar í fokus

Men hóast vallistin ikki er tøkur enn, hevur Miðflokkurin funnið fram til, hvørji mál skulu á dagsskránna í valdystinum hjá lítla flokkinum við øðrvísi sjónarmiðunum. Umframt traditionella politikk floksins við sterku átrúnaðarligu dimensiónunum fara Jenis av Rana og hansara fólk fram til 8. februar at seta umstrídda útlendingamálið í fokus.

- Miðflokkurin fer í hesum valdystinum at kasta ljós á skammiligu viðgerðina, útlendingarnir í Føroyum hava fingið frá núverandi samgongu. Samstundis fara vit eisini at leggja dent á yvirornaða spurningin um føroyska tjóðarfrælsið, sigur Jenis av Rana. Spurdur um ítøkiligu sjónarmið Miðfloksins viðvíkjandi útlendingamálinum er formaðurin greiður.

- Síðani nýggja samgongan tók við, eru stórar broytingar farnar fram á útlendingaøkinum, og vit meta støðuna vera skammiliga. Útlendingar í Føroyum hava onga trygd fyri degnum í morgin, og hesum ætla vit at finnast at og steðga, sigur Jenis av Rana. Høvdingin í Miðflokkinum sigur, at vit úr skriftunum í Gamla Testamentið fáa greið boð um, hvussu vit skulu fara við okkara útlendingum.

- Skriftin áleggur okkum orðarætt at taka okkum av teimum fremmandu í okkara samfelagi, tí eisini vit vóru einaferð fremmand. Hesa skyldu hevur núverandi samgonga so dyggiliga svikið, er náðileysi dómurin hjá Jenisi av Rana.

Sum Jenis longu hevur víst á í miðlunum í seinastu viku, umboðar Miðflokkurin eisini tað sjónarmið, at føroyingar eiga at leggja seg út í donsk viðurskifti og danskan politikk, so leingi vit eru partur av ríkisfelagsskapinum.

- 90% av okkara lógum stava úr Danmark og eru fyrireikaðar á Christiansborg, og tí eiga føroyingar at krevja at vera partur av tí prosessini eisini, metir Jenis av Rana.

### 40.000 krónur

Triði valdysturin innanfyri eitt ár er nú spakuliga farin í gongd, og spurdur, hvussu fíggjarliga orkan er til enn ein valdyst hjá einum so lítlum flokki, er Jenis bjartskygdur.

- Vit eru ein lítil flokkur og hava tí ikki dýrar vanar. Okkara útreiðslur til valdystirnar er langt niðanfyri alt tað, størru flokkarnir nýta, og vit megna tí saktans enn ein valdyst, sigur Jenis av Rana. Formaðurin sigur, at flokkurin leggur dent á ikki at fara út um síni fíggjarlig mørk og koma í skuld, og tí verður ikki satsað tað stóra.

- Meðan aðrir flokkar nýta milliónir, nýta vit sera lítið. Býráðsvalið í heyst kostaði okkum umleið 40.000 krónur, og vit vænta umleið somu upphædd hesuferð, sigur Jenis av Rana at enda.

## Javnaðarflokkurin stuðlar Norðuratlantsbólkinum

FÓLKATINGSVAL
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Áðrenn evstamark á blaðnum mánadag á middegi var vallisti Javnaðarfloksins framvegis ikki til reiðar. Av floksskrivstovuni varð sagt, at smáting framvegis skulu fáast upp á pláss, og ongar viðmerkingar vórðu gjørdar til, hvørjir einstaklingar vera á listanum og ikki.

### Skilagott at samstarva

Aðrastaðni á síðuni tekur Jørgen Niclassen úr Fólkaflokkinum frástøðu frá arbeiðinum í Norðuratlantsbólkinum, sum Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum hevur havt seinastu fýra árini, men løgmaður hevur ikki somu áskoðan sum kappingarneytin úr Fólkaflokkinum.

- Eg meti tað var skilagott at samstarva við grønlendingar í Norðuratlantsbólkinum, tí føroyingar og grønlendingar hava ávís viðurskifti til felags, og tí fer Javnaðarflokkurin at stuðla og luttaka í einum Norðuratlantsbólki, um vit fáa eitt umboð, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men løgmaður leggur tó dent á, at innihaldið í samstarvinum skal umdefinerast og vera øðrvísi enn tað, vit hava sæð seinastu fýra árini.

- Føroyska og grønlendska sjálvstýrismálið eru ikki parallell, og tí skulu vit ikki tvinna tvær ymiskar sjálvstýristilgongdir. Hetta hava vit sæð í alt ov stóran mun seinasta valskeiðið, sigur løgmaður, sum tó stuðlar idéini um eitt framhaldandi samstarv í Norðuratlantsbólkinum.

### Stillar upp

Løgmaður vil eins og hansara floksfelagar ikki siga nakað um listan sjálvan, men hann váttar, at hann sjálvur stillar upp og fer harvið at hjálpa flokkinum, hóast hann sum løgmaður ikki sjálvur kann gerast fólkatingslimur.

- Flokkurin hevur heitt á meg um at stilla upp, og hesum havi eg játtað. Meiri kann eg ikki siga í løtuni, sigur Jóannes Eidesgaard at enda.